Anna Kristina Samson, Stjørnan:

# Alt kann henda

**Hóast mótstøðuliðið ikki hevur tapt móti føroyskum liði í tvey ár, so hava stjørnurnar úr Klaksvík góðar vónir til finaludystin**

COCA-COLA FINALA
*Jákup Mørk*

Eftir at Stjørnan fyri tveimum árum síðani gjørdist føroyameistari, hevur tað verið VÍF, sum síðani hevur sett seg á føroysku hondbóltstrúnuna.

### Bara ein dystur

Somikið tryggur hevur sessurin verið, at síðstu tvey árini hava tær ikki tapt í heimligum høpi, men hetta hevur tó á ongan hátt fingið mótstøðuliðið í finaluni at missa mótið.

- Sjálvandi hevur lagið verið gott seinastu vikuna. Allar eru til reiðar at fara til Havnar, og nú spælið hevur gliðið betri enn tað gjørdi beint fyri jól, so er lagið í hópinum eisini gott, heldur liðskiparin á liðnum, Anna Kristina Samson.

Spurd, hvussu leikararnir seta seg upp til dyst móti einum liði, sum ikki hevur tapt í tvey ár, hevur hon ongan patentloysn, men hon heldur tó ikki, at Stjørnan er uttan møguleikar.

- Tá talan bert er um tann eina dystin, sum ein finala jú er, so kann alt henda. Vit mugu bara gera okkara besta, og so fáa vit at síggja, hvussu leikur fer.

- Munurin í dystunum hjá okkum móti VÍF hevur heldur ikki verið so stórur. Kanska hava tað serliga verið málverjarnir, sum hava verið á muni. Ikki tí at vit hava nakran vánaligan málverja, tí hava vit als ikki, men Manuela hevur bara verið tað betri, sigur liðskiparin hjá Stjørnuni.

### Veðrið avger stuðulin

Annars gleða tær úr Klaksvík seg til finaluna, har tær vóna at fáa góðan stuðul frá hópin av klaksvíkingum.

- Nú er tað nakað síðani, at vit seinast vóru í finaluni, so tað er sjálvandi nakað, sum vit gleða okkum til. Tær hjá okkum, sum eisini spæla fótbólt, hava sjálvandi verið í finaluni, men hetta er tó nakað heilt annað. Her er nógv meira fokus á, og áskoðararnir eru nógv fleiri, og tað ger tað sjálvandi til nakað serligt.

Júst áskoðarnir úr Klaksvík hava annars altíð borið orð fyri at vera nakað serligt. Stjørnan hevur eisini boðað frá, at skipað verður fyri bussferð til Havnar, men liðskiparin er eitt sindur ivandi um, hvussu nógv fara at taka av hesum.

- Tað eru í øllum førum nógv, sum siga seg ætla við, men veðurlíkindini eru einki serlig. Tað veldst altíð um, hvussu veðrið verður, men verður tað á eini leið, so ivist eg ikki í, at vit fáa dyggan stuðul, heldur hon.

Tá vit at enda spyrja Annu Kristinu, hvør lutur í teirra spælið kann gerast avgerandi fyri finaludystin, sigur hon, at tað sum so er uttan týdning.

- Vit skulu bara hava heildina í spælinum at rigga somikið væl, at tað samanlagt er nóg mikið at vinna. Gera vit tað, so kunnu vit ikki krevja meira. So einfalt er tað, heldur altso Anna Kristina at enda.

*- Nú er tað nakað síðani, at vit seinast vóru í finaluni, so tað er sjálvandi nakað, sum vit gleða okkum til, sigur liðskiparin hjá Stjørnuni*



## Avboð til landsliðið

**Hans Fróði Hansen er seinastu í røðini av leikarum, sum hava givið avboð til venjingarleguna á Cypros hjá fótbóltslandsliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Síðani Jógvan Martin Olsen, sum í løtuni tekur sær av fótbóltslandsliðnum, fyri góðum mánaði síðani gjørdi av, hvørjar leikarar hann vildi hava við sær til Cypros á venjingarlegu, eru alsamt fleiri nøvn gliðin av listanum.

Umframt at eingin fótbóltsútiseti verður við á ferðini, hava Jens Kristian Hansen, Sámal Joensen og Fróði Benjaminsen boðað frá, at teir ikki eru tøkir, og hóskvøldið fekk virkandi venjarin so enn eitt avboð.

Hans Fróði Hansen, sum seinnu árini hevur verið fastur fúsur í landsliðsverjuni, hevur fyri stuttum stovnað egið virkið, og hetta forðar nú honum í at vera við á ferðini.

- Støðan er tann, at eg noyðist niður í arbeiðsørindum, og hetta fellur júst um sama mundið, sum venjingarlegan er, so havi sæð meg noyddan at geva avboð, sigur Hans Fróði, og hann leggur afturat, at tað avgjørt ikki er við gleði at hetta er gjørt.

- Eg havi onkuntíð fyrr givið avboð, men tá hevur tað verið vegna skaða. Hetta er fyrsta ferðin, at eg ikki eri við, hóast mær einki bilar, so tað var eitt sindur tungt at boða venjaranum frá hesum.

Spurdur, um arbeiðsbyrðan sum sjálvstøðugur vinnurekandi er somikið stór, at onnur avboð eisini kunnu hugsast, tá undankappingardystirnir móti eitt nú Týsklandi eru á skránni, er stinni verjuleikarin tó sera avgjørdur.

- Í løtuni kenni eg meg noyddan at fara á tað skeiðið, sum talan er um, men tosar tú um dystin móti Týsklandi, so vildi skeið verið skeið. So má eg heldur missa tann veitaran, sigur Hans Fróði Hansen at enda.

Sóley Mikkelsen, VÍF:

# Royna at gera sum vant

**Hóast tær at kalla bert hava vunnið seinastu bæði árini, so heldur liðskiparin hjá VÍF ikki, at motivatiónin til dystin verður nakar trupulleiki**

COCA-COLA FINALA
*Jákup Mørk*

Hjá VÍF kvinnunum tykjast tær gera nógv burturúr, at so lítið sum gjørligt skal gerast burtur úr steypafinaluni, sum er á skránni leygardagin.

Í øllum førum sigur liðskiparin, Sóley Mikkelsen, at vikan higartil hevur gingið akkurát soleiðis, sum flestu vikurnar hjá teimum gera.

- Vit hava vant sum vanligt, og undan dystinum fara vit eisini at fyrireika okkum sum vant. Hittast hjá onkrum av leikarunum, sum búgva í Havn, eta ein bita og fáa ein drekkamunn, meðan vit tosa um dystin.




*- Eg haldi ikki, at tað vildi gagnað nøkrum, um vit nú skuldi gjørt nakað serligt burturúr. Tað kann í øllum førum bara órógva, um vit brádliga fara at broyta upp á ting, sum annars hava riggað væl, heldur Sóley Mikkelsen um fyrireikingarnar til dystin*

Sjálv ivast Sóley heldur ikki, at hetta er rætti hátturin at fyrireika seg til ein slíkan dyst. Ikki minst, tá tað í aðrar mátar hevur gingist so væl hjá VÍF.

- Eg haldi ikki, at tað vildi gagnað nøkrum, um vit nú skuldi gjørt nakað serligt burturúr. Tað kann í øllum førum bara órógva, um vit brádliga fara at broyta upp á ting, sum annars hava riggað væl.

### Verjan skal rigga

Hóast tær tykjast gera lítið burturúr, so leggur Sóley tó dent á, at tær í VÍF eru uppsettar til dystin. Eisini hóast liðið hevur sópað alla mótstøðu til viks í tvey ár.

- Sjálvandi eru vit uppsettar til dystin, og tað mugu vit eisini vera, um vit skulu vinna.

- Europa Cup dystirnir, sum hava kostað nógva orku, eru fingnir burtur úr høvdinum, og sjálv haldi eg, at hugurin á leikarum er í topp í løtuni. Ikki minst var tað slítandi í hesum sambandi, at vit byrjaðu so tíðliga at venja, tí vit roknaðu við at spæla í september, men tað kann hinvegin hava givið okkum ein kropsligan fyrimun, soleiðis at vit ígjøgnum mest sum allan dystin kunnu halda eina høga leikferð.

Meira enn ferðin á spælinum, heldur Sóley tó, at tað verður verjan, sum verður avgerandi fyri, um VÍF kann vinna steypakappingina annað árið á rað.

- Verjan verður heilt víst avgerandi. Tað hevur alla tíðina víst seg, at um vit fáa verjuna at rigga, so koyrir álopsspælið væl, so tað er heilt víst nakað, sum vit skulu satsa 100% upp á í dystinum, sigur hon at enda.



Jacob Jónsson, Neistin:

# Ferðin skal upp

**Liðskiparin hjá Neistanum ivast ikki í, at StÍF og Neistin eru før fyri at geva áskoðarum ein undirhaldandi dyst**

COCA-COLA FINALA
*Jákup Mørk*

Í Neistanum hevur tað mesta gingið sína vanligu gongd, hóast prátið í vikuni sjálvandi hevur snarað um steypafinaluna, sum verður leygardagin.

- Venjingin hevur verið tann vanliga. Vit hava verið í høllini tríggjar ferðir hesa vikuna, so tað er einki nýtt í tí, sigur liðskiparin, Jacob Jónsson.

Tað skerst tó ikki burtur, at tað kortini er dysturin leygardagin, sum hevur malið í tonkunum á leikarunum, og liðskiparin viðgongur eisini, at so er.

- Sjálvandi hava vit hugsað nógv um StÍF. Teir hava verið sera væl koyrandi seinastu dystirnar, um sæð verður burtur frá dystinum móti VÍF um vikuskiftið, og tá vóru teir eisini rættiliga skerdir, tí Costin Dumitrescu ikki var við.

Spurdur, um tað kanska kann vera eitt vápn hjá Neistanum at taka leikandi StÍF-venjaran úr spælinum, sigur Jacob, at tað sjálvandi er ein møguleiki.

- Talan er fyrst og fremst um tvey lið, sum skulu dystast, og StÍF eigur nógvar og góðar leikarar. Tað skerst tó ikki burtur, at Costin er ein týdningarmikil partur av liðnum. Hann er helst besti leikarin á liðnum, og eg haldi so eisini, at hann er millum teir allar bestu í landinum. Tí kann tað sjálvandi koma upp á tal, men tað eru tvey lið, sum skulu avgera dystin.

### Ferð skal á

Tá tosið fellur inn á, um Jacob hevur nakrar vónir til steypafinaluna, ivast liðskiparin ikki í, at talan kann gerast um ein dyst av teimum heilt góðu.

- Talan er um tvey lið, sum kunnu spæla skjótan og góðan hondbólt, og hava báðir partar ein góðan dag, ivist eg ikki í, at talan verður um ein sera góðan dyst.

- Tað er tó neyðugt hjá okkum, at vit fáa ferðina nóg høgt upp. Síðani jólasteðgin hevur tað at kalla bert verið nóg gott í ein hálvleik móti H71, men leygardagin skulu vit so hava hana upp. Tað eru vit snøgt sagt noyddir til, um vit ætla okkum at fáa hendur á steypinum, eru avgjørdu orðini.

- Eg rokni so avgjørt ikki við, at nakar av okkara leikarum metir, at vit eru favorittar, tí tað eru vit ikki. Strandingar hava eitt sera gott lið, ið sum sagt er væl koyrandi, so vit skulu spæla upp til okkara besta, um vit skulu vinna dystin, sigur liðskiparin hjá Neistanum, áðrenn hann leggur aftur:

- Eg havi bert eina ferð áður verið í steypafinaluni Tað var við Kyndli, og vunnu vit tá á Neistanum. Hesa ferð vil eg so sleppa at vinna steypið við Neistanum.



*- Tað skerst ikki burtur, at Costin er ein týdningarmikil partur av liðnum. Hann er helst besti leikarin á liðnum, og eg haldi so eisini, at hann er millum teir allar bestu í landinum, sigur Jacob Jónsson*

Jón Rasmussen, StÍF:

# Hepni skal til

**Uttan hepnið gest einki, heldur liðskiparin hjá StÍF, sum tó ikki er í iva um, at StÍF sjálvsagt hevur sín møguleika í dystinum leygardagin**

COCA-COLA FINALA
*Jákup Mørk*

Eins og liðskiparin hjá Neistanum, so vil Jón Rasmussen hjá StÍF ikki siga, at serliga nógv er gjørt burtur úr venjingini hesa vikuna.

- Venjingin hevur ikki verið stórt øðrvísi, enn hon plagar at verða. Jú, kanska hevur hon verið eitt lítið sindur lættari enn vanligt. Vit royna ikki at gera ov nógv burturúr, tí tað kann bara merkja, at vónbrotið verður størri, um vit ikki vinna.

### Allir tøkir

Annars tykist liðskiparin hjá strandingum hava góðar vónir til dystin leygardagin.

- Allir mans eru tøkir. Costin hevur sjálvandi havt ein skaða í fingrinum, men hann verður so við. So fáa vit at síggja, hvussu væl hann er fyri, heldur Jón, sum annars letur væl at gongdini seinastu dystirnar.

- Tað hevur gingið hampuliga væl hjá okkum nú. Vit taptu sjálvandi stórt í Vestmanna, men tann dysturin var kanska nakað serligt. Teir høvdu meira at spæla fyri enn vit. FM er í øllum førum fokið fyri okkara viðkomandi, og so vildu teir helst eisini hevna seg fyri tapið í hálvfinaluni, haldi eg.

### Lættari við einum dysti

Fyri uttan fyri standandi, so kann tað kanska tykajst soleiðis, at StÍF er í ferð við at gerast eitt »steypalið«, sum ofta slær til í stóru dystunum, meðan avrikini ikki eru nóg støðug í landskappingini, og liðskiparin er heldur ikki heilt ósamdur í hesum.

- Tað er í øllum førum soleiðis, at vit hava lættari við at seta okkum upp, tá alt verður avgjørt yvir ein dyst. Tað hongur kanska eisini saman við, at fót- og hondbólturin órógva hvørt annað nakað. Teir, sum spæla fótbólt á liðnum, hava verið í gongd í mest sum eitt ár út í eitt, og serliga undan jólasteðginum merktist hetta væl. Jólasteðgurin gav tó eitt sindur av hvíld, og síðani hevur tað gingið munandi betri hjá okkum.

Hvørt tað hevur gingið somikið væl, at talan verður um sigur í dag, vil liðskiparin einki siga um, men hann ivast ikki í, at møguleikin er til staðar.

- Fyrst og fremst skulu vit hava neyðuga hepnið, tí uttan tað gerst einki. Teir hava eitt sera sterkt lið, sum kanska eisini hevur størri breidd enn okkara, og so hava teir eisini ein fyrrverandi liðfelaga hjá okkum á liðnum.

Spurdur, um tað er ein eyka orsøk at vinna, at John Petersen nú spælir ímóti StÍF í einum finaludysti, sigur liðskiparin, at tað er tað kanska ikki.

- Eg kann ikki siga, at tað er ein eyka orsøk, men tað ger tað í øllum førum uppaftur stuttligari, um vit vinna, sigur hann at enda.



*- Tað er í øllum førum soleiðis, at vit hava lættari við at seta okkum upp, tá alt verður avgjørt yvir ein dyst, sigur liðskiparin hjá StÍF um ta sannroynd, at liðið tykist standa seg betri í steypaenn landskapping*